# Hjørdis 65 ár

Ein Fuglfjarðardama í Havn verður 65 ár leygardagin 12. september. Eg má ásanna, at tíðarbilið er komið eitt sindur óvart á meg, men árstølini eru ikki at taka feil av. Kanska er ein mamma altíð er ein mamma – treytaleyst av áramálum... Og so heldur hon sær eisini væl. Tillukku við degnum!



Mamma mín, Hjørdis Sigurðsdóttir Christiansen (f. Simonsen), varð borin í heim 12. september 1944. Hon var tann 6. í røðini av 9 børnum. Sigurð, bróður hennara, sum eisini varð føddur undir krígsárunum, hevur skemtiliga tikið til, at tað ikki var so nógv tilfar tøkt tá. Tey bæði eru nakað lægri á vøkstri enn eldru og yngru syskinini. Veit ikki, um tað hevur týdning uppá aðrar mátar, men tað er ikki sørt, at Hjørdis er knøpp í vendingini og altíð klár, tá eitthvørt er á skránni. Helst hava umstøðurnar eftir kríggið sett síni spor og ávirka lyndið eisini.

Hjørdis fór 14 ára gomul til Havnar at tæna. Fyrst í Skálabúðini, síðani hjá Eigil Gunnarsson og til síðst hjá Viggo Planck. Í 1962 fekk hon arbeiði í Sápuhúsinum. Um kvøldarnar tók hon handilsskúla, fyri síðani at fara á sjúkrasystraskúla í 64-68. Hjørdis giftist Jóhan Christiansen, syni Eli Christiansen, 10. august 1969. Børnini fekk hon í 1970 (Eli), 1972 (Elsu Mariu) og 1987 (Jóhan Martin).

Hjørdis hevur upplivað Havnina í eina hálva øld. Tíðarnar eru alsamt vorðnar betri, men tað er ikki so sjálvdan, at hon tekur til gomlu hugnaligu Havnina í 60'árunum. Hetta var ein góð og lukkulig tíð hjá eini ungari bygdardamu. Eisini í mun til trongligu eftirkrígsárini. Tá var meira friður, enn tað er í dag, vildi hon sagt.

Hjørdis er á ein hátt av gamla slagnum, arbeiðir við trúfesti og stendur ikki í fremstu røð at krevja. Tó ivast tú ikki í, hvar tú hevur hana. Hon er ítøkilig og kontant. Og hon fylgir væl við tí, sum fyriferst runt hana og í samfelagnum. Hjørdis hevur altíð verið trúføst í staðbundnu samkomuni og móti sínum egna heimi og húsi, sum altíð hava verið væl røkt. Hon hevur gingið til matgerð og fimleik í eitt mannaminni. Hon gongur nógvar túrar. Og mín sann, um hon ikki av og á fer niðan á Tórsbreyt.

Av lyndi er Hjørdis løtt, nærverandi og blíð. Hetta hevur verið eyðmerkið í heimi hennara. Hon hevur eggjað børn síni til sjálvsvirði, men eins nógv at vísa virðing og gestablídni móti vegis øllum fólkum.

Í Orðtøkunum 31, 25-31 er brot av lýsing av eini dugnaligari konu, sum kemur mær til hugs, tá eg hugsi um mammu mína:

"Klædd í styrki og heiður gongur hon við smíli hini komandi tíð ímóti. Hon letur upp munnin við vísdómi, og kærleiksáminning er á tungu hennara. Hon hevur eyga við, hvussu gongur í húsi hennara, og letibreyð etur hon ikki. Synir hennara stíga fram og prísa hana lukkuliga; maður hennara reisist og rósar henni: „Mangar dugnaligar kvinnur eru, men eingin er móti tær!" Vænleiki svíkur, og vakurleiki er fáfongd; tann kvinna, sum óttast HARRAN, skal verða róst. Lat hana fáa ávøkst handa hennara, og verk hennara skulu prísa henni í býportrunum!"

Eg fari við hesum at takka tær fyri farnu góðu árini, sum hava gingið væl og skjótt. Og ynski tær alt tað besta framyvir!

**Vegna børnini, Eli**

# Tummas í Tøðuni í Vági

## – Keisarin - 200 ár



Leygardagin, 12. september kl. 14, verða eftirkomarar bodnir til fyrireikandi fund í Vágs Bridge & Billiardfelagshúsi í samband við, at Tummas í Tøðuni 7. august 2010 hevði fylt 200 ár.

Tummas Jacobsen (1810-1883) giftist í 1833 við Elsebeth Joen-Willumsdatter (1812-1861). Tey fingu 9 børn: Elisabeth Maria Thomasdatter, Lisa á Mýri (1833-1907), Anna Sofía Thomasdatter (1835-1912), Ole Johan Thomassen, Óli í Tøðuni (1836-1906), Thomas Vinther (1938-1838), Elsebeth Frederikka Vinther, Elspa í Líðini (1839-1931), Thomas Pauli Vinther (1843-1843), Niclas Vinther, Niklas í Brekkugerði (1844-1896), Magnus Vinther, Magnus í Brekkugerði (1848-1936), og Thomas Vinther, Tummas á Oddafløtti (1851-1912).

# Salli á Hellunum 95 ár

Sunnudagin 13. september verður Salomon Johannesen, vanliga kallaður Salli, í Fuglafirði 95 ár.



Salli er annars hellumaður. Foreldur hansara vóru Sigurbjørg, sum var ættað úr Íslandi og Magnus av Hellunum. Tey vóru fýra systkin.

Lívið hjá Salla hevur verið á sjónum. Hann fór til skips 15 ára gamal, og er ein av teimum færri og færri føroyingum, sum hevur upplivað deyðsiglara, t.v.s. skip uttan motor.

Í 1935 var Salli við Sigurfarinum í Grønlandi, og teir vóru í sama illveðrinum sum Blithsome, ið gekk burtur, og har manningin varð bjargað av Coraliu.

Salli hevur eisini siglt undir krígnum. Hann var við Forsøk, sum var ein av norsku bátunum, sum rýmdi undan norsku hersetingini. Men tíbetur vóru teir ikki út fyri nakrari ógvusligari hending.

Í 1958 fór Salli við Báruni hjá gøtumonnum við Meinhard Jensen, ættaður av Hellunum, búsitandi í Norðragøtu, sum skipara.

Har kom eg at kenna Salla. Hetta var mín fyrsti túrur til skips undir Ísland í sjálvdrátti. Vit gjørdust væl og hava verið tað til hendan dag. Salli var stak fittur at vera saman við. Hann var lættur av lyndi, og hann var góður við teir ungu. Slíkt verður ikki gloymt.

Seinni var Salli átta ár við Kongshavn, sum róði út við bátum undir Grønlandi. Hann var kokkur og kendur sum ein góður kokkur. Tað var ikki minst stuttligt hjá honum, tá skipað varð fyri samkomu fyri manningina á Kongshavn fyri nøkrum árum síðani.

Í 1967 var Salli við Marité tann tilíkna ringa heimtúrin. Salli hevur vissuliga upplivað eitt sindur av hvørjum á sjónum

Síni seinastu ár á sjónum sigldi Salli við farmaskipinum Svani hjá Skipafelagnum. Hann fylti 60 ár á Kappanum, og hann sigldi til hann var 62 ár. Tá hevði hann eisini verið nærum 50 ár á sjónum og hevði tænt sína vernaplikt fyri samfelagið.

Salli er ein fróðarmaður, sum dugur væl at greiða frá, sum tað sæst í fleiri frásøgnum hansara í FF-blaðnum. Hann hevur givið sítt íkast til søgu fiskimanna.

Tey, sum hava áhuga fyri hesum, kunnu fara inn á: www.fiskimannafelag.fo og síðan fara inn á pdf fílir av FF-blaðnum nr. 357 og 365.

Salli flutti fyri nøkrum árum síðan á Vesturstovu í Fuglafirði, har tey eisini hava havt nógva gleði av honum.

Nú eru sporini tó farin at tyngjast. Salli giftist ikki, men hann hevur góða ætt um seg.

Góði Salli, hjartaliga tillukku við tínum kempualdri. Tað hevur verið stuttligt at kenna teg.

**ó.**

# Tøkk

Eg takki øllum hjartaliga, sum á ymiskan hátt mintust meg á 90 ára føðingardegnum tann 1. april 2009.

**Miebeth Jacobsen Kirkja**
**(Sambýlið á Heygnum)**

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá góði bróðir okkara

**Joen Jacob Gaard Joensen**
Vanliga nevndur Jack

andaðist og var jarðaður.

**Systkini við familjum**

# Heðin Zachariasen 50 ár



Sunnudagin 13. september fyllir Heðin 50 ár. Heðin hevur fingið nógv á skafti hesa tíðina, hann hevur livað. Hann hevur ikki ligið á latu síðuni, tað kunnu vit róliga siga.

Heðin kom upp í politikk sum 32 ára gamal, tá hann bleiv valdur inn í kommununa. Fyrsta skeiðið sum varaborgarstjóri, síðan bleiv hann borgarstjóri til 2005, tá kommunurnar løgdu saman við Sunda kommunu. Heðin bleiv fyrst valdi borgarstjóri í Sunda kommunu. Tað starvið røkti hann til seinasta val, tá hann valdi ikki at stilla uppaftur.

Umframt at hava verið virkin í kommunal- og landspolitikki seinastu árini, hevur Heðin eisini nakrar fyritøkur, sum hann nú hevur betur tíð til at røkja.

Við ynskjum um blíðan byr framyvir.

Heðin, hjartaliga tillukku.

**E**

### 85 ára føðingardagur

Leygardagin 12. september verður Dania Dam, Kollafjørður, 85 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum í Kollafirði frá kl. 12-18. Øll eru hjartaliga vælkomin

### Prógv

Týsdagin 24. august varð Malan Ludvig, Tórshavn, cand. mag í námsfrøði frá Københavns Universitet

### Dagurin

11. september. Hildibjartur. Føroyskt navn fyri Hillebert, sum var biskupur í Tours í Fraklandi og doyði í 1134. Upprunaliga týskt navn, ið merkir stríð og bjartur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*